# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 20.11.2023 kl. 16.30

Á fundi: Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi
Eir J. Norðberg
Poul Laust Christiansen

Ikki møtt: Janus Thomsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-93-2023: Umsókn um marknaumskipan – við Neyst/p-økið við vøllin, Hvalba.**
   Umsókn frá Umhvørvisstovuni vegna Landsverk, har søkt verður um marknaumskipan í sambandi við breiðkan av vegnum frá við Neyst og inn til parkeringsøkið við vøllin í Hvalba.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan av nevnda øki.

2. **102-88-2023: Avtala um vetrarhald 2023/2024 v.m.**
   Kostnaðurin hjá Landsverk fyri kavarudding og at koyra á fyri hálku hækkar munandi veturin 2023/2024.
   Tilboð uppá plógv og saltspreiðara frá KJ.
   **Vega- og havnanevndin 15.11.2023:**
   Nevndin er samd um at mæla til at taka av tilboðnum frá KJ uppá plógv og saltspreiðara.
   **Fíggjarnevndin 20.11.2023:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at gera avtalu við Landsverk veturin 2023/2024.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

3. **102-68-2023: Tilboð uppá vegbungur.**
   Tilboð uppá vegbungur 40 km/t 6 m frá NORT og JSS Sp/f.
   **Vega- og havnanevndin 15.11.2023:**
   Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá JSS Sp/f.
   **Fíggjarnevndin 20.11.2023:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá JSS Sp/f.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

4. **102-91-2023: Skriv viðvíkjandi vatnleiðing til matr. nr. 244, Hvalba.**
Skriv, har søkt verður um at fáa vatnleiðing lagda til ognina matr. nr. 244, Hvalba.
**Tekniska nevnd 13.11.2023:**
Nevndin mælir til at keypa 200 m av 25 mm slangu við tí treyt, at umsøkjarin sjálvur grevur leiðingin niður og bindur í høvuðsleiðing, hetta verður gjørt í samráð við vatnmeistaran. Eir J. Norðberg hevði uppskot um at beina málið aftur í Teknisku nevnd.
**Avgerð:**
Atkvøtt varð fyrst um tilmælið hjá Teknisku nevnd. Tvær atkvøður vóru fyri og fýra ímóti og er sostatt fallið. Síðani varð atkvøtt um uppskotið hjá Eir J. Norðberg. Samtykt við fýra atkvøðum fyri.

5. **102-92-2023: Umsókn um byggiloyvi til tilbygning á matr. nr. 98c, Hvalba.**
Søkt verður um byggiloyvi til amboðs-skúr á 16 m2, har vatn ikki verður lagt inn og bundið verður ikki í spillivatnsskipanina. Grannaloyvi fyriliggur, tá bygt verður nærri at marki enn 2,5 m.
**Tekniska nevnd 13.11.2023:**
Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum, tekning og treytum annars sambært BK17.

6. **102-84-2023: Innkomið tilboð uppá liðugtgerð av skrásetingum.**
Tilboð uppá liðugtgerð av skrásetingum (rottangar/samlibrunnar, oljutangar, vatnleiðingar).
**Tekniska nevnd 13.11.2023:**
Nevndin mælir til ikki at taka av hesum tilboði, tá peningur ikki er játtaður til endamálið.
**Fíggjarnevndin 20.11.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at taka av hesum tilboði.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

7. **102-94-2023: Innkomin tilboð uppá gøtuljós.**
Tilboð eru uppá 15 stk. gøtuljós frá El-tænastuni Sp/f og Bærendsen Teknik Sp/f.
**Tekniska nevnd 13.11.2023:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Bærendsen Teknik Sp/f, um møguligt er at keypa 10 stk. gøtuljós.
**Fíggjarnevndin 20.11.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Bærendsen Teknin Sp/f, um kommunan kann keypa 5 stk. gøtuljós fyri sama prís pr. stk, hesi skulu setast upp í Sandvík.

**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt, eftir tilmæli frá Ronni Hammer, at keypa 6 stk. gøtuljós frá Bærendsen Teknik Sp/f. Hesi verða sett upp í Sandvík.

8. **102-90-2023: Tilboð uppá livandi mentan frá Rami.**
Tilboð uppá 9 sagnir á føroyskum og enskum yvir 3 ár við víðari menning, viðlíkahaldi og eftirliti við heimasíðu og skeltum.
**Trivnaðarnevndin 15.11.2023:**
Meirilutin í nevndini mælir til at taka av tilboðnum frá Rami.
**Fíggjarnevndin 20.11.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at taka av hesum tilboði. Nevndin mælir heldur til at fáa onkran á staðnum at lesa søgur og sagnir inn og seta QR kotur inn á.
**Avgerð:**
Atkvøtt varð um uppskot frá Thorstein Thomsen at beina málið aftur í Trivnaðarnevndina til at kanna, um onkur her á staðnum kann gera hetta og kostnaðin av hesum. Einmælt samtykt at beina málið aftur í nevnd.

9. **102-85-2023: Fíggjarætlan 2024 – 2. viðgerð.**
Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til kr. 35.595.000,00, íroknað útreiðslur til eldrasamstarvið BHS kr. 9.921.000,00 og afturgjald av skuld kr. 3.000.000,00. Løguútreiðslurnar eru kr. 3.450.000,00. Inntøkurnar eru mettar til kr. 35.621.000,00, harav inntøkan frá eftirlønargjøldum, DIS og FAS er kr. 9.921.000,00 sambært meting frá FMR.
Skattaprosentið verður broytt úr 20,6% til 20,4% og barnafrádrátturin óbroyttur kr. 6.500,00.
**Fíggjarnevndin 20.11.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at góðkenna fíggjarætlanina fyri 2024.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

10. **102-55-2023: Eykajáttan 2023 – 1. viðgerð.**
Umsókn um eykajáttan kr. 3.700.000,00.
**Fíggjarnevndin 20.11.2023:**
Einmælt samtykt at mæla til at taka undir við umsóknini um eykajáttan 2023.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

11. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.00

Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson Martin í Nesi
Thorstein Thomsen Eir J. Norðberg Poul Laust Christiansen